ítróttur

Nr. 180 • hósdagur • 22. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hálvur føroyingur norðurlenskur meistari í styrkilyfting

**30 ára gamli norðmaðurin, Olaf Dahl, sum hevur føroyska mammu, bleiv í vikuskiftinum norðurlenskur meistari í styrkilyfting í bólkinum 125+ kilo. NM-kappingin í styrkilyfting varð hildin í Borlänge í Svøríki**

STYRKILYFT
*Jákup Mørk*



*Her stendur nógv á í beinbend*

Kappingarnar í styrkilyftting eru settar saman av trimum lyftum: beindbend (squat), bonkpress (benchpress) og rættstøðulyft (deadlift).

Í beinbendi bleiv tað til 320 kilo hjá Olafi. Liggjandi á beinkinum pressaði hann 250 kilo upp frá. Og í rættstøðulyft knógvaði hann 320 kilo. Samanlagt lyfti Olaf 890 kilo. Í allari kappingini var Olaf tann lyftarin, ið lyfti mest í bonkpress.

Slíkar kappingar verða eisini gjørdar upp í stigum. Umframt sjálva lyftingina verður tá eisini tikið hædd fyri, hvussu nógv lyftarin sjálvur vigar. Teir løttu lyftararnir standa seg ofta væl her, og tí varð ein lyftari, ið vigar 67,20 kilo, kosin besti lyftari.

Olaf hevur áður verið við í NM-kappinginum, men ikki við so góðum úrsliti sum hesaferð. Eisini hevur hann luttikið 8 ferðir í kappingini um sterkasta mann í Noregi. Her gjørdist hann fyrr í ár nummar trý. Næsta stóra avbjóðingin er heimsmestaraskapið í styrkilyfting í 2006, sum verður í Stavanger í Noregi.

Sterki hálvføroyingurin, sum býr í Tróndheimi, hevur vant styrkilyfting, síðani hann var 19 ára gamal. Hann venur 6 dagar um vikuna einar 3-4 tímar hvørja ferð. Um veturin verður vant fram til NM, og um summarið verður tíðin sett av til kappingarnar um sterkasta mann. Tá ið Olaf ikki venur ella er til kappingar, stendur lesnaðurin á skránni.

Mamma Olaf er Jóhanna Elisabeth Sofía, vanliga nevnd Hannefía, f. Niclasen, úr Hvalba. Pápin eitur Svein Dahl og er ættaður úr Aalesund. Tey búgva í Tróndheimi.

# FM 100 km Súkkling

**Torkil Veyhe, Gunnar Dahl-Olsen og Sverri Mohr Edvinsson, gjørdust allir føroyameistarar, tá FM í 100 km súkkling varð hildið leygardagin**

SÚKKLING
*tíðindaskriv*



*Gunnar Dahl Olsen, sum her sæst fremstur, og Torkil Veyhe drógu frá hinum súkklarunum, tá farast skuldi um Eiðisskarð*

Soleiðis eita føroyameistararnir í súkkling á 100 km. Kappingin var seinasta leygardag, hin 17.09.2005.

Leiðin gekk av keiini á Toftum, til Funnings, um Eiðisskarð, suður gjøgjum sundalagið, niðan á Oyggjarvegin og málið var á vegnum við plantusøluna í Hoyvík. Unglingarnir fóru tó ikki niðan á Oyggjarvegin, men gjøgnum tunnilin til Havnar.

Uppmøtingin til kappingina var vánalig, og tað er væl skiljandi, tí veðrið var av tí ringasta til súkkling. Serliga tí farast skuldi niðan í fjøllini at súkkla. Men í alt vóru 8 súkklarar møttir á Toftum, og tí var avgjørt at byrja kappingina. Hóast veðri var ringt, vóru trygdarumstøðurnar góðar, tí fleiri fylgibilar vóru súkklarunum til hjálpar, um okkurt skuldi verið.

Allir fylgdust fyrsta teinin inn móti Funningi, men niðan á Eiðisskarð slitnaði alt sundur. Gunnar fór frá Esmari, meðan Torkil fór frá Sigmundi og Bergi. Gunnar og Torkil fylgdust líka til rundkoyringina í Kollafirði, tá Torkil fylgdi leiðini hjá unglingunum gjøgnum tunnilin, meðan Gunnar fór um Oyggjarvegin til Havnar.

Hjá teimum vaksnu súkklaði Esmar einsamallur, eisini unglingarin Sigmund og Bergur súkklaðu einsamallir alla leiðina til Havnar.

Tá vóru motiónistarnir snildari, teir gjørdu nevniliga av at fylgjast so langt sum gjørligt. Á henda hátt hjálptust teir, serliga í móti vindinum, har teir skiftust um at liggja fremst, meðan hinir hvíldu seg aftanfyri. Tá teir komu til brekkuna úr Kollafirði niðan á Oyggjarvegin skiltust teir, Sverri koyrdi nakað skjótari enn hinir niðan, meðan Kjartan ikki kláraði at fylgja gamla góða Evaldi eftir Oyggjavegnum.

Á málinum høvdu trúføstu fólkini sum hjálpa til í súkklifelagnum skipa fyri við ymsum, har var, uttan kostnað, sunkist, kaffi, heitt kakao og bollar at fáa, hetta mundi eisini koma væl við hjá køldu áskoðarunum og vátu súkklarunum.

### Úrslitini vóru hesi

**Unglingar**

1 Torkil Veyhe Unglingar
2 Sigmund Olsson U
3 Bergur Ingemarsson U

**Vaksin menn**

1 Gunnar D. Olsen Elita
2 Esmar Joensen Elita
3 Sverri M. Edvinsson Motión
4 Evald Rasmussen Motión
5 Kjartan Egholm Motión

# Sviin aftur á odda

**Bæði Heini Olsen og Hans Kristian Simonsen vóru í dag partur av remis talvum, meðan Johan Eriksson enn eina ferð fekk fult móti Helga Dam Ziska**

TALV
*Jóannes Hansen*

Í dag eydnaðist tað svenska IM Johan Eriksson aftur at leggja seg einsamallan á odda í altjóða talvkappingini, Klaksvík International, sum í hesum døgum er í Leikalund í Klaksvík. Í triðja umfarinum vann hann við svarta fólkinum á Helga Dam Ziska, og í dag vann hann aftur á yngsta føroyska telvaranum. Hesa ferð var tað við hvíta fólkinum. Eftir 43 leikir legði Helgi kongin. Undan sætta umfarinum lógu IM Johan Eriksson og Hans Kristian Simonsen undir liðini á hvør øðrum. Í dag spældi Hans Kristian remis móti danska IM Jens Ove Fries-Nielsen. Teir samdust eftir 49 leikir um, at talvið var javnt. Í dag hevði Hans Kristian svarta fólkið. Tá ið teir hittust í triðja umfarinum, hevði Hans Kristian hvíta fólkið. Eisini ta ferðina endaði talvið við remis.

FM Heini Olsen og norski IM Eirik Gullaksen samdust í dag um remis eftir 50 leikir. Hesa ferð hevði Heini hvíta fólkið. Í triðja umfarinum vann Heini við svarta fólkinum á norska IM aranum.

Støðan eftir seks umfør er henda:

1. IM Johan Eriksson 4,5 stig,
2. Hans Kristian Simonsen 4,0 stig,
3. FM Heini Olsen 3,5 stig,
4. IM Eirik Gullaksen 2,5 stig,
5. IM Jens Ove Fries-Nielsen 2,5 stig
6. Helgi Dam Ziska 1,0 stig.